# Hvítu Húsini ávirka raðsendingar

Handritini til raðsendingar sum Beverly Hills, Drew Carey og Skaðastovan verða ávirkað av Hvítu Húsunum, veit internetritið Salon.com at siga.

Seinastu tvey árini hevur ein deild hjá amerikansku stjórnini, sum stríðist ímóti rúsevnum, verið við til at avgera leikgongdina í kendum sjónvarpsraðsendingum. Endamálið hevur verið at broyta hugburðin hjá ungfólki til rúsevni.

Sjónvarpsfeløgini hava fingið nógvar pengar burtur úr avtaluni, sum seinastu 18 mánaðirnar hevur kostað Hvítu Húsunum 175 milliónir krónur.

Sambært Salon.com er lógin brotin, tí tað skal altíð upplýsast, hvør stuðlar sendingum so ella so. Men í hesum førði er einki upplýst um, at Hvítu Húsini hava stuðlað.

# Eitur hóttir veiðumenn

Kanningar vísa, at veiðumenn í Eysturgrønlanndi hava stórar mongdir av eiturevninum PCB í blóðnum. Hetta veit blaðið hjá *Dansk Polarcenter* at siga frá.

Eitrið stavar frá kópum og øðrum havdjórum, sum eru dálkað av stórum mongdum av umhvørviseitri úr stóru ídnaðarlondunum. Granskarar ávara um, at eiturevni kann hava fosturskaðar við sær, og teir mæla til eina fyribyrgjandi kostætlan fyri veiðumenninar

Kanningin er sett í verk av felagsskapinum AMAP, sum er heldur eygað við polarumráðnum. Úrslitini av kanningini, sum ikki er liðug enn, er gjørd í umráðnum við Ittoqqortoormiit (á donskum Scoresbysund), vísa, at 60% av veiðumonnunum hava so nógv PCB í blóðnum, at tað granskarar stúra fyri støðuni.

# Hanus og Aldubáran aftur á pallin



Konsertirnar við Hanus Johansen og Aldubáruni, sum vóru hildnar í Norðurlandahúsinum í september í fjør, vóru so væl fagnaðar, at nú verður ein endurtøka av hesum konsertum.

Leygarkvøldið 5. februar kl. 19.30 fara Hanus og Aldubáran í Norðurlandahúsinum aftur. Á skránni eru nýggj og eldri løg hjá Hanusi, men útsetingarnar hjá fólkunum í Aldubáruni eru nýggj.

Hanus hevur sett løg til yrkingar hjá Poul F., Sverra og Tummas Napoleon Djurhuus, Hans Andrias Djurhuus, Bernhard Brim og Rikard Long.

Í Aldubáruni spæla hesaferð: Andrea Heindriksdóttir (floytu), Adam Simonsen (klarinett), Páll Sólstein (horn og klaver), Sámal Petersen (Fiól), Ólavur Jakobsen (gittar), Edvard Nyholm Debess (bass og sang) og Stamen Stanchev (ljómborð og klaver).

Atgongumerki fáast í Norðurlandahúsinum og á Kunningarstovuni í Havn og Klaksvík.

# BT og Ekstrablaðið stóra afturgongd

Donsku fyrrapartsbløðini BT og Ekstrablaðið missa framhaldandi lesarar. Eftir einum ári er talið á lesarum hjá teimum báðum bløðunum samanlagt minkað við 14%.

Fyritøkan Initiative Universel, sum hevur kannað støðuna hjá BT og Ekstrablaðnum, kallar seinasta árið fyri eitt vanlukkuár fyri tey bæði bløðini.

Tað eru serliga tey ungu, sum venda BT og Ekstrablaðnum bakið, og hetta kemst av øktu kappingini frá sjónvarpi, vikubløðum og interneti. Øll tey donsku bløðini hava trupulleikar við at halda fast um lesarar úr 13 og upp í 29 ár, men serliga stór er afturgongdin hjá fyrrpartsbløðunum.

– BT og Ekstrablaðið skulu veruliga taka sær um reiggj skulu tey venda skeivu gongdini, sigur Ole Prehn, fjølmiðlagranskari, við blaðið Aktuelt.

**Subject:** Teldubræv
**Date:** Fri 21. jan. 2000
**To:** post@sosialurin.fo
**From:** san-oea@friaurf.no
**Reply to:** san-oea@friaurf.no

TELDU-POSTURIN

# Har deyðin fær frið

Nakrar vikur eru nú farnar síðani ræðuligu tokvanlukkuna á Rørås-leiðini. Eftirskjálvtarnir kjennast framvegis í norska samfelagnum. Tokvanlukkan kravdi 19 mannalív. Tað eru knappir tveir mánaðir síðani tvíkiljan Sleipner silgdi á skerið Bloksa, og 16 fólk druknaðu. Framvegis verður nógv tosa um hesar vanlukkurnar. Um skuld, ábyrgdarleysa leiðslu og um dølskar politikarar, sum lova nógv tá ólukkur henda, men ofta gloyma tað eins skjótt og stóru yvirskriftirnar í fjølmiðlunum hvørva. Hví var eingin álítandi trygdarskipan á tokunum, og hví var skerið ikki ljósmerkt?

Minningarguðstænastur hava verið hildnar. Nøvnini og myndir av teimum deyðu hava verið í sjónvarpi, útvarpi og bløðunum. Alt landið syrgir hesi, sum so órættvíst vóru skrødd burtur. Mong teirra ung, við lívinum framman fyri sær, til løtuna, tá meiningsleysa vanlukkan hendi. Tvíkilju- og tokvanlukkan kostaðu samanlagt 35 fólkum lívið.

Her í Norra henda hvørt einasta ár deyðsvanlukkur sum samsvara týggju tílíkum stórum vanlukkum. Men hesum vanlukkum verður lítið gjørt burturúr. Eitt stað millum 250 og 350 fólk doyggja hvørt einasta ár í norksu ferðsluni. Fyri hesi verður einki minningarhald varpað út í hvørt einasta heim. Sjáldan trínur nakar politikari fram á skíggjan og sigur at »her má okkurt munagott gerast alt fyri eitt!«. Eingin rópar um at finna tann ella tey sum hava ábyrgdini. Yvir eitt týggjuáraskeið doyggja eini 3000 fólk í ferðsluni. Fleiri enn alt fólkið á Vágoynni. Leggja vit tey sum fáa álvarsligar snuddir, ella gerast avlamin afturat, koma vit nærri fólkatalinum í Havnini. Uppá einans 10 ár! Og vit tosa um eitt land sum eitur Norra - eitt framkomið, nútímans, vælútbúgvið fólk, sum hevur ráð at keypar teir tryggastu bilarnar. Fara vit longur út í Evropu, fara deyðtølini kvikliga framvið fólkatalinum í Føroyum.

Men deyðans andlit gerst so kámt í ferðsluvanlukkunum. Deyðin á vegunum er so gerandisligur, at vi næstan ikki geva honum ans - um hann ikki rakar okkum beinleiðis. Á vegunum fær deyðin frið at lívbjarga sær. Ár eftir ár. Ein her, eina har. Tvey her og trýggjar har. Ikki ov nógv í senn. Ikki so nógv at tað skapar øsing og fólkakrav um betri trygd, so sum tok-, skipa- ella flogvanlukkur oftast gera.

Ein bussur í Karasjok fór útav í fjør heyst. Trý børn doyðu. Ikki av tí at bussurin endaði í ánni, men av stoytinum tá tey vórðu slongd gjøgnum bussin. Hevði trygdarbelti verið í skúlabussinum høvdu hesi børnini helst verið á lívið nú. Trygdarbelti í bussum er óhent og putlut fyri ferðafólkið. Tað varð eisini sagt, tá kravið um bilbelti kom. Í dag festa tey flestu bilbeltið, uttan at hugsa um tað. Men tíverri ikki øll. Verri er tað, at tað framvegis eru nógv, sum ikki festa børnini. 20 børn vórðu millum teirra, sum doyðu í ferðsluvanlukkum í fjør. Fleiri teirra vóru ikki í trygdarbelti.

At ferðin drepur, serliga á hálum vegum, vita øll. Men vit hava jú so stóran skund, lægri ferð tarnar okkum í at náða alt vit skulu. Bert spell fyri tey mongu, sum ongantíð komu fram. Ferð og trygdarbelti mugu vit sum koyra bil sjálvi taka part av ábyrgdini fyri. Men meginparturin av ábyrgdini fyri høgu deyðstølini liggur hjá teimum sum hava valdið, kunnu smíða lógir, áseta reglar og gera neyðugar íløgur í tryggari vegasamband. Sjálvandi ber tað til at gera nógv meira við óhugnaligu hagtølini. Við hvørt er tað ein spurningur um pengar, men tað er *altíð* ein spurningur um vilja. Viljan til at síggja deyðan, har hann dagliga hevur sína gongd, og ikki bert tá hann gerst so ovursjónligur á forsíðuni ella skíggjanum, tá stóru vannlukkurnar henda.

**Bjørt Samuelson, Oslo**

post@sosialurin.fo



## FØÐINGAR

9. januar fingu Eileen Hansen og Gert Poulsen, Frederikshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3710 gr.

10. januar fingu Petra og Johnni Müller Jacobsen, Klaksvík, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3400 gr.

12. januar fingu Tina og Eyðsvein Joensen, Hoyvík, eina dóttir. Hon var 54 cm. long og vigaði 3550 gr.

12. januar fingu Jóngerð Mine Olsen og Rúni Olsen, Keypmannahavn, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3100 gr.

14. januar fingu Eilen og Jákup Mikkelsen, Haslev, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3250 gr.

14. januar fingu Fríðun Hansen og Meinhard Jacobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4800 gr.

14. januar fingu Hildigunn Magnusson, Klaksvík og Claus Vester, Ramløse, eina dóttir. Hon var 52 cm. long og vigaði 3800 gr.

16. januar fingu Malan og Peter Holm, Norðragøta, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4050 gr.

16. januar fingu Annika Juul Magnussen og Andras Ziska Davidsen, Keypmannahavn, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3050 gr.

18. januar fingu Jensa og Victor Andreasen, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaið 3800 gr.

18. januar fingu Anna Abelsen, Eiði og Vilhelm Samuelsen, Vík, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3200 gr.

18. januar fingu Durita og Dánial Petur Hansen,Toftir, eina dóttir. Hon var 52 cm. long og vigaði 3450 gr.

19. januar fingu Magnus og Maud Poulsen, Miðvágur. ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3900 gr.

20. januar fingu Siri og Heri Niclassen, Vestmanna. eina dóttir. Hon var 54 cm. long og vigaði 4000 gr.

20. januar fingu Erland Petersen og Sandra Mikkelsen, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3800 gr.

## ANDLÁT

13. januar:
**Johannes Jensen,** Skopun, 77 ár
15. januar:
**Bjarki Skaale,** Skopun, 83 ár
**Jóannes Frederik Davidsen,** Kvívík, 82 ár
**Elsa Magnussen,** Saltangará, 82 ár
16. januar:
**Terji Nielsen,** ættaður úr Sumba, búsitandi í Hvidovre, 35 ár
18. januar:
**Kjartan Jensen,** Sandur, vanliga nevndur Kjartan á Heyggi, 80 ár
**Mathilda Havn Rasmussen,** 92 ár
19. januar:
**Jógvan Matras Absalonsen,** á Viðareiði, 71 ár

## KIRKJUR & SAMKOMUR

### Gudstænastur 3. sunnudag eftir trettanda

*Havnar kirkja:* kl. 11.00, Sverri Steinhólm
*Nólsoy:* kl. 12.00, Sonja Klein
*Argja kirkja :* kl. 11.00, Heri Joensen
*Kollafjørður:* kl. 12.00, Uni Næs
*Sjóvar kirkja:* kl. 12.00, altargangur, Jógvan Fríðriksson
*Glyvrar:* kl. 11.00, altarg., Jónsvein Bech (Talvan gongur fyri Bíbliufelagið)
*Hvalvík:* kl. 12.00, latarg., Martin R. Jacobsen (Talvan gongur fyri Guds orðs boðan í Hvalvíkar, Hósvaíkar, Haldarsvíkar o gTjørnuvíkar kirkjum)
*Sandavágur:* kl. 12.00, altarg., David Johannesen (Talvan gongur í øllum kirkjum í Vága prestagjaldi fyri Guds orðs útbreiðslu
*Eiði:* kl. 11.40 skriftamál, kl. 12.00 messa
*Norðskála:* kl. 17.00 messa, Emil Olsen
*Vesturkirkjan:* kl. 11.00, Bergur D. Joensen
*Vágur:* kl. 11.00,
*Fámjin:* kl. P. M. Rasmussen
*Leiti:* kl. 12.30, altarg., Elsa Funding
*Christianskirkjan:* kl. 11.00, Hans Eiler Hammer
*Árnafjørður:* kl. 12.00, altarg., Niels Pauli Danielsen
*Hvannasund:* kl. 12.00, Meinhard Bjartalíð (Talvan gongur fyri Føroysku Sjómanskirkjuna)

### Frá Ebenezer

Møtirøðin við John í Skemmuni og Símun Pætur á Torkilsheyggi heldur áfram fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20.00. Sunnudagin kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangeliskt møti og kl. 21.00 Útimøti. Mánadagin kl. 20.00 Bønarmøti.

### Tórshavnar Hvítusunnusamkomu

Sunnudag morgunmøti kl. 11. Kl. 12.15. Sunnudagsskúl. Kl. 18 Evangeliskt møti.

### Samkoman Immanuel

Sunnudagin kl. 13.00 Sunnudagsskúli. Sunnukvøldið kl. 19.00 Møti.

### Meinigheitin í Hoyvík

Sunnudagin kl. 14.00 í Hoyvíkar skúla er sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18.00 møti har Jón Joensen talar. Mánakvøldið kl. 20.00 bønarmøti hjá Ova og Katrin, Tórgarðsgøta 18. Verið øll hjartaliga vælkomin. Vit eru við í tiltakinum frá »Minus til Plus«.

### Meinigheitshúsið í Havn

Missiónsvikan byrjar sunnukvøldið og heldur fram vikuna út. Sunnukvøldið kl. 18 talar Heri Joensen, Manskórið á Sandoynni luttekur. Mánakvøldið kl. 20 talar Sørin Steinhólm, Toftir, Kristiliga sangkórið luttekur.

### Rhema á Hálsi

Sunnudagin verður onki møti í Rhema vegna felagssjónvarpsmøti úti í Filadelfia kl. 18.

### Aglow, Tórshavn

Fundur verður í **hølunum hjá Frelsunarherinum** leygarkvøldið kl. 20.00, allar kvinnur eru vælkomnar.

### Frelsunarherurin Tórshavn

Sunnudag kl. 11.00 Halgunarmøti, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og kl. 18.00 Møti.

### Filadelfia, Landavegur 22

Í dag kl. 06.00 morgunbøn, kl. 17.00 landsbøn, í morgin kl. 06.00 morgunbøn, kl. 11.00 morgunmøti, kl. 18.00 møti, kl. 22.00 útimøti (um viðrar). Mánadagin kl. 06.00

### Havnar kirkja

Várkonfirmatiónirnar 2000 verða 9. apríl og 16. apríl. Konfirmantarnir skulu møta í Havnar kirkju mánadagin 24. januar kl. 15.00.

Markið millum Suðurstreymoyar eystara og vestara prestagjald er Tróndargøta, Varðagøta og Villingardalsvegur.

### Vesturkirkjan

Konfirmantarnir í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi møta týsdagin 25. januar í Vesturkirkjuni kl. 15.00. Konfirmatiónirnar verða 9. og 16. apríl. Havið dópsbrævið við.

### KFUM og KFUK í Havn

Mánadagin kl. 15.00 í KFUK Eldrasamkoma v/ Jógvani Frídrikssyni evni: Bøn og stillar løtur. Týsdagin kl. 16.00 í KFUK: Várgleði fyri børn.

### Glæman í Kvívík

Vikuskiftismøtir verður í Glæmuni 22.-23. jan. Leygardagin kl. 20.00 talar Regin Høgnesen og Hansina Johannesen syngur. Sunnudagin kl. 18.00 talar Agnar Nielsen Vestmanna, sangbólkurin Gittit syngur og Fríða Petursdóttir endar. Øll eru vælkomin.

### Missiónshúsið Kollafjørður

Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli. Kl. 18.00 møti við Christian V. Svendsen frá Ísraels Missiónini. Høvið verður at geva eina gávu til arbeiði. Drekka verður aftaná.
Týsdagin: Bíbliutími kl. 20.00 Job kap. 32 og 33.

### Zion, Kollafjørður

Ungdómsmøtini byrja aftur leygarkvøldið 22.1. kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Hvalvíkar Missiónshús

Í kvøld kl. 20.00, luttøka úr Vík og Tjørnuvík. Innsavnan til húsið. Sunnudagin kl. 15.00 Familjumøti v/ Jónu Thomsen, kl. 18.00 møti v/ Teir 4 úr Havn, innsavnan.

Mánakvøldið kl. 20.00 kemur Sjómanskvinnuringurin saman. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Meinigheitshúsið á Skála

Sjómanskvinnuringurin kemur saman mánakvøldið kl. 20.00.

### Keldan, Skálafirði

Fríggjakvøldið kl. 20.30 Vón fyri framman, við luttøku úr Haldarsvík. Leygarkvøldið kl. 21.00 Opið hús, sunnudagin kl. 17.00 Møti við Pola Jacobsen. Barnamøti kl. 17.00.

### Runavík

Evangeliskt møti verður leygardagin kl. 19.00. Húsmøti verður týsdagin kl. 20.00 í Fuglafirði hjá Eydnu.

### Aglow Suðuroy

Fundur verður leygarkvøldið kl. 20 í hølunum hjá Tvøroyrar Handverkarafelag. Allar kvinnur eru vælkomnar.

### Missiónshúsið á Tvøroyri

Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Sunnukvøldið kl. 18 verður møti við Hjørdis og Jørgen Frants Jørgensen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Betel, Vágur

Sunnudagin: Breyðbróting kl. 11.00. Sunnudagsskúli kl. 13.30 og Evangel. fundur kl. 18.00.
Mánadagin: Bønarfundur kl. 20.00.
Ónsdagin: Uppbygg. fundur kl. 20.00.

### Samkoman, Sion Vági

Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00, kl. 11.30: Sunnudagsskúli. Evangeliskt møti kl. 18.00.
Telefonandaktin svarar á 373777.

## *Eitt ljós á gøtu míni*



*3. sunnudag eftir trettanda er teksturin úr Luk. evang. 17, 5-10.*

Tá ið lærusveinarnir hildu seg treingja til at biðja hesa bøn, um meiri trúgv, hvør mikið meira tá ikki vit. Ella er tað ikki okkara dagliga sorg og trupulleiki, at tað alsamt er so nógv vantrúgv og so nógvur fátrúni okkara millum? Nøkur menniskju hava tó ferð eftir ferð fingið prógv um Guðs trúfesti og mátt - kortini hava vit trupult við at trúgva honum. Og mugu altíð av nýggjum biðja gomlu bønina: »Harri, gev okkum meira trúgv!«

Trúgv at hann livir… tí tað kunnu, so ófatiligt tað ljoðar, eisini vera løtur tá ið sjálv vissan um, at Guð er til, verður andfiktað. Trúgv at hann ræður - eisini tá ið vit ikki síggja tað, tá ið alt sær gátufult og tokut út fyri okkum, at vit tó við bindi fyri eygunum mitt í myrkrinum mugu halda fast við: Tað er Guð, ið ræður! Trúgv at hann stendur við orð sítt, at fyrijáttarnir hansara eru ikki vøkur skriftstøð, vit kunnu heingja upp til prýðis, men andaligur veruleiki, sum vit kunnu liva í, og doyggja í, um tað skal vera. Trúgv at tað hjálpir at biðja - bønin er ikki bara vælformaði suffandi orð, ið stíga upp frá foldini og frígera tað biðjandi mannasinnið, men bønin er ein megi, ið rørir hin himmalska máttin, og setir ævigar kreftir ígongd. Trúgv, at tað nyttar at verða í tænastu hjá honum - einki er vónleyst, tá ið Guð er við í tí; tað kann henda nakað avgerandi við einum hvørjum - eisini við mær - tá ið Guð í himlinum vil tað.

Einki nyttar, at vit taka okkum saman og knýta nevarnar, meðan vit halda hendurnar saman. Tá til stykkis kemur er trúgvin Guðs undurfulla gáva. Tí er í veruleikanum bara ein vegur at fara - vegurin, lærusveinarnir fóru, tá ið teir bóðu: »Harri, gev okkum meira trúgv!«

Tú, Jesus, er tann einasti, ið kann. Amen!

**John S. Myllhamar, trúboðari**

## Læknavaktir

**Tórshavn:**
*Læknavaktin* tlf. 310033.

**Eysturoy:**
*Leygardagin 22. jan.:* Sverri Lamhauge, tlf. 448016
*Sunnudagin 23. jan.:* Sverri Lamhauge, tlf. 448016

**Norðoyggjar:**
Magnus Magnussen, tlf. 455451

**Vágar:** tlf. 332413

**Suðuroy (norður):**
Tlf. 371560

**Suðuroy (suður):**
Tlf. 373030

### Tannlæknavakt, Tórshavn

Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13–14. Tlf. 314544.